# All That Rain í Fuglafirði



Leygarkvøldið fer lívligi føroyski rockbólkurin All That Rain at spæla til dans í Fuglafirði. Tiltakið verður í Mentanarhúsinum, har góður umstøður eru at hava tónleikatiltøk.

All That Rain spældi nógv í summar, men seinastu vikurnar hava teir ikki veirð nógv úti. Orsøkin til tað er, at sangarin í bólkinum. Hans Ravnsfjall, hevur verið í skúlaørindum í Danmark, men hann kemur heim til tiltakið leygarkvøldið.

Umframt Hans Ravnsfjall spæla eisini Henning Nicodemussen og Jens Tummas Ness í bólkinum. Meðan All That Rain hevur hildið ein stuttan steðg, hava teir spælt við gamla bólkinum hjá teimum, Kjølar.

Men nú eru teir aftur har, teir hava lagt størstu orkuna seinnu árini – í All That Rain.

Bussamband er úr Havn, av Toftum og av Strondum í sambandi við dansin leygarkvøldið.

# Nýggj fløga frá Messell




**Hósdagin gevur Messell út eina nýggja fløgu, har bara ein sangur er á. Here I Am #3 kallast útgávan**

TÓNLEIKUR

*Pop.fo*

Føroyski tónleikarin Terji Messell, sum er búsitandi í Danmark, gevur síðsta dagin í oktober út nýggja fløgu. Útgávan verður presentera á Torvecaféen í Nibe.

Á fløguni, sum hann kallar Here I Am #3 er bara ein sangur, og fløgan kann bara keypast umvegis heimasíðuna hjá Messell – www.messell.tk.

Fyrr í ár kom útgávan Uninhibited hjá Messel, og á hesari útgávu eru Here I Am nummar 1, 2 og 4.

Átta tey fyrstu eintøkuni av nýggju fløguni eru heilt serlig. Átta ymisk listafólk hava gjørt húsan til hesar fløgur, umframt at trý eykaløg eru á. Listafólkini eru Henry F, Ova, Tórhild Tolfsen, Malle-fotografi, Ricco Madsen, ian, Scarabello og Simon L.

# Norðurlendski samleikin

**Røða, Jóannes Eidesgaard helt í Norðurlandaráðsfundi í Helsingfors í vikuni**



Den nordiske idé bygger på et udbredt værdifællesskab omkring kultur og demokrati. Det er den nordiske identitet. Et fællesskab mellem suveræne stater og mellem de selvstyrende lande. Et gennemgående tema i mange papirer, der er blevet produceret i de sidste par år om det nordiske samarbejdes fremtid, omtaler begrebet fuld deltagelse. Det må nu være på tide, at man tager skridtet fuldt ud og giver de selvstyrende lande fuldt medlemskab af Nordisk Råd og Nordisk Ministerråd. Jeg ved godt, at der er formelle forhindringer, men vi har tradition for at overvinde sådanne forhindringer, såfremt viljen er dertil.

Vestnorden står på denne sessions dagsorden med medlemsforslaget Håndslag for Vestnorden. Vi er naturligvis glade for denne opmærksomhed, men vi bør benytte anledningen til i just denne sammenhæng at tage op spørgsmålet om de selvstyrende landes fulde deltagelse i samarbejdet. Et samarbejde er først et godt samarbejde, når det foregår mellem ligestillede og ligeberettigede parter.

Lad os derfor fejre det nordiske jubilæum ved at tage spørgsmålet om de selvstyrende områders fulde medlemskab op.

Jeg er sikker på, at alle vil få større glæde af de selvstyrende landes fulde medlemskab. Det er et grundlæggende træk ved det nordiske samarbejde, at det bygger på, at vi gensidigt har noget at give hinanden. Tillad mig blot at erindre om, at Nordisk Råds musikpris gik til en komponist fra Færøerne, hvilket må ses som en anerkendelse af, at de mindre nationer har noget at give Norden også på det kulturelle områder.

Vi skal ikke opfattes som problembørn i den nordiske familie. I en af de mange rapporter om Nordisk samarbejde, der fremkom i anledning af tusindårskiftet står det, at uden de selvstyrende landes fulde deltagelse i samarbejdet er dette samarbejde formålsløst. I Vismandstrapporten og i den efterfølgende rapport En Ny Nordisk Dagsorden er der stillet forslag om at udvide det nordiske samarbejde til Vestnordens naboer i syd og i vest. Dette er en god idé med perspektiver i.

## VIÐMERKINGAR

# Í 1992 IMF í 2002 OECD

**Heri Mohr**



Í seinastu viku skrivaði Høgni Hoydal í bløðunum, at tað er eitt frálíkt og neyðugt uppskot, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsbankastjórin eru komnir við, nevniliga at biðja OECD at kanna føroyska búskapin.

Her mugu vit ásanna, at framstig eru hend, tí í 1992, tá kvæðakempur, sum í mong ár høvdu dansað so lystiliga um gullkálvin, brádliga tagdu, og dansiringurin varð slitin, komu uttanveltaðir serfrøðingar frá IMF óbodnir at kanna trotabúgvið Føroyar, meðan vit nú í 2002 fáa at vita frá hægsta tindi, at vit mugu biðja serfrøðingar frá OECD gera regluligar kanningar um støðuna í okkara landi; - og soleiðis sum lesarabrævið hjá landsstýrismanninum í lógarmálum er formulerað, skilja vit, at høvuðsorsøkin til at biðja um hesa hjálp úti í stóru verð er, at í løgtinginum er stórt tvassarí, har rópt verður í eystur og svarað í vestur.

Álvarslig og ikki sørt ræðandi orð frá okkara varaløgmanni.

Hetta "frálíka og neyðuga" uppskot inniber m.a., at uttanveltaðir serfrøðingar skulu gera eina "rating" (hvussu tað so skal skiljast) av føroysku uttanlandsskuldini, men ikki verður sagt, at landskassans millióna skuld til føroyskar stovnar v.m. eisini skal "ratast".

Flest øll vita, at landskassans milliarda skuld til Týskland, Schweiz og onnur lond varð umskipað í 1993 til lán úr ríkiskassanum - p.t. 4.2 milliardir (5% p.a.) har av ein hálv milliard er rentu og avdráttarfrí - og tað má tí vera lánið úr ríkiskassanum, sum OECD við "rating" skal geva okkum eina neyðuga serkøna hjálpandi hond ?

Landsstýrismaðurin vil vera við, at ikki fyrr enn í 1999 "fingu vit dagførdar roknskapir fyri landskassan", og at áðrenn tað kom roknskapurin "ikki fyrr enn nógv ár seinni". (Undirstrikað av HM).

Hetta er ósatt, og landsstýrismaðurin hevur ætlandi ikki lisið landskassans ársroknskap 1990, har (á síðu 1) m.a. er tilskilað: "Í undanfarnu árum er landskassans ársroknskapur prentaður og útgivin 8 til 12 mánaðar eftir fíggjarárslok, Á mangan hátt hevur tað verið óheppið, at landskassans ársroknskapur hevur verið gamal, tá ið hann er farin til prentingar, - hann hevur m.a. mist nakað av tí politiska aktualitetinum.

Við nýggjum amboðum og broyttum reglugerðum er gjaldstovan nú før fyri at fáa ársroknskapin frá hondum og prentaðan 5 mánaðar eftir árslok".

Í greinini hevur landsstýrismaðurin í lógarmálum sett upp 7 høvuðspunktir, ið OECD skal hjálpa okkum at fáa svar upp á. Í einum av punkt-unum verður spurt nakað soleiðis: Hvør er munurin millum búskapin og búskaparpolitikkin í dag og í 80-unum, tá allur blokkurin varð brúktur, og eingin skuld varð goldin ?

At allur blokkurin í 80-unum varð brúktur til tað, ið hann var og er ætlaður til, nevniliga sjúkrahúsverkið, almannaverkið og skúlaverkið er ikki meira enn sjálvsagt.

Frá l. januar 2002 varð skúlaverkið yvirtikið, og sum vituligt er, so varð tann parturin av blokkinum, sum viðvíkti skúlaverkinum, tá tikin úr blokkinum.

Men tá ið landsstýrismaðurin kunngerð, at landskassin ikki rindaði sína skuld í 80-unum, so er eisini tað heilt burtur við.

Í 80-unum vórðu øll landskassalán goldin, so hvørt terminsgjøldini fullu til gjaldingar, og tað er meira enn, hvat sigast kann um tað einsamalla gjaldførislánið uppá 300 milliónir, sum landskassin tók miðskeiðis í 90-unum. Tað er fleiri ferðir fallið til gjaldingar og hvørjaferð endurnýggjað.

Um nakrar vikur verður tað óivað aftur endurnýggjað ?

Í bóklinginum "Frá heimastýri til fullveldi", sum landsstýrið gav út 2000, fingu vit at vita (síðu 26), at búskaparfrøðingar vóru av teirri áskoðan, at løtan var tann rætta at fara undir at byggja upp ein sjálberandi búskap, tí minni enn ein triðingur av tí danska stuðulinum verður brúktur í samfelagnum, og at restin skal goymast og nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd. Lesa vit landskassans roknskapir 1998-2001, síggja vit, at í hesum tíðarskeiði hevur landskassin fingið

- úr ríkiskassanum ………………… 3.921 milliardir
- meirinntøkur í skatti og gjøldum (§ 50.52) íroknað 392 mió. frá Fíggingargrunninum ………………………… 1.446 "

Hvussu hevur so hendan goymda uppsparingin hilnast? - Tað duga óivað øll at rokna út, tá ið vit fáa at vita, at innistandandi í Landsbankanum í umrødda tíðarskeiði er økt við 1.368 mia. - Kanska søgan "Konen med æggene", sum H. C. Andersen skrivaði, rennur onkrum í hug ?

Tá ið teir OECD serkønu fara at blaða í okkara almennu roknskapum, verða glómur í teimum eitt nú av landskassans standardkonto: Lønir v.m., sum uppá 4 ár er økt við 49% og Landsbankans konto: Starvsfólkakostnaður, sum í sama tíðarskeiði er økt við 72%.

Látur er hóast alt betri enn grátur. Maðurin, sum vildi vita, hvussu orðið OECD skuldi skiljast, fekk svar frá einum hittinorðaðum. Tað er eitt samtak á høgum stigi:

Opera Elysium C Dur við halleluja kóri.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 1. november til hósdagin 7. november

# Eg haldi, at eg livi




*Bert 46 ára gamal fekk navnframi tónleikarin Jógvan Telling Joensen í 1993 ein blóðtøpp í heilan. Hann gjørdist lamin og misti fullkomiliga førleikan at tosa. Frá at vera ein sera virkin tónleikari og tónleikalærari, skuldi Jógvan Telling frá degi til annan læra seg at liva av nýggjum. Sjúkan førdi m.a. við sær, at Jógvan gjørdist óarbeiðsførur og misti alt, sum hann átti. Hann hevur síðani sjúkan rakti stríðst eitt hart stríð, bæði fyri at vinna sær førleikar aftur, men eisini eitt stríð ímóti einari stirvnari føroyskari heilsuskipan. Í dag er Jógvan Telling ein sera aktivur maður, sum mest av øllum bert er glaður fyri lívið.*

*Lagt til rættis: Barbara Samuelsen.*

# Sjómanssendingin Vitin

*Gesturin í Vitanum hesuferð er Petur Steingrund fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni. Hann er giftur og eigur tveir synir.*

*Vit hoyra nógv sera forvitninsligt um havið, gróður, hitan í sjónum og fiskin við Føroyar.*

*Hvussu nógv toskasløg eru við Føroyar?*

*Túsundavís av toski eru merktir við Føroyar, men hvar, nær og hvussu koma merkini aftur í aftur?*

*Hvørjar upplýsingar geva fiskamerkini sum eru løgd inn í fiskin?*

*Hvussu nógv fáa fiski- og útróðrarmenn fyri fiskin og merkini??*

*Hann heldur at tað eru fleiri ósvaraðir spurningar við útviklingslæruni, heldur enn við skapanarlæruni.*

*Hann trýr á Jesus sum Guðs einborna son, og trúgvin gevur lívinum innihald.*

*Vertur er Símin Hansen.*

*Vitin er at aftur at hoyra, sunnudagin kl.15.00 og hósdagin kl.16.00*




## Olsen bandin - í Jútlandi




## Meiri fyri minni




## Fólk og frítíð




## Gesturin

